# Nøvn

## Ein takkar- og ein nýggjárskvøða



Tá eg síggi aftur á árið, sum er farið, so er tað tann eini dagurin, sum stendur oman fyri allar aðrar føðingardagurin 22. juni - tá eg helt mín 60 ára dag.

Fyrst vil eg takka samkomuni og leiðsluni í Kelduni í Skálabotni fyri ta stóru vælvild, tit vístu mær og konuni, at vit fingu brúkt tykkara hølir, sum gjørdi føðingardagin til eina góða og ríka sanguppliving.

Eg hugsi um tykkum mongu, sum gleddu meg við at møta so fjølment við blómum, gávum, talum, blíðum heilsanum og nógvari praktiskari hjálp.

Eg hugsi um tykkum, sum vóru í køkinum og gjørdu matin til og settu út á borðini, og tit, sum gingu millum borðini, so einki tørvaði har.

Eg hugsi um míni kæru børn, svigarbørn og abbabørn, sum bæði spældu, undirhildu, pyntaðu hølini og bóru fram eina ómetaliga vakra heilsan bæði í myndum og orðum.

Eg hugsi um Ebenezerkórið, Vitan úr Betesda, kvinnurnar úr Nebo, og tykkum, sum sungu solo og duet – tit lyftu løtuna upp á eitt fjølbroytt og serligt sanguppliviIsi.

Eg hugsi um tykkum, sum talaðu tær nógvu og góðu talurnar.

Eg hugsi um tykkum, sum meistarliga leiddu skránna og frálíka felagssangin.

Eg hugsi um tykkum, sum so blídliga tóku ímóti gestunum og vístu teimum pláss.

Eg hugsi um mammu mína, sum eisini dyggiliga tók sítt tak; bara spell at pápi ikki upplivdi hendan dagin.

Til seinast, men ikki minst, so hugsi eg um elskaðu konu mína, sum einaferð enn vísti sítt avbera góða hegni at skipa fyri og hava yvirblikkið, og sum einsamøll gjørdi skránna fyri alt kvøldið.

Tá eg hugsi um tykkum øll, so kann eg ikki annað enn takka Harranum fyri ta stóru signing, Hann gav mær hetta kvøldið, tá eg rundaði tey 60.

Takk øll somul við nógvum ynskjum um eitt eydnusamt 2011 fyri tykkum øll.

**Poul Jóhan**

# Minningarorð um Meinhardt Olsen

### f. 30.06.1930 - d. 24.10.2009

Meinhardt varð føddur 30. juni í 1930 á Toftum. Foreldrini vóru Sigmund Olsen av Regni og Josefina Olsen av Dunga (f.Mikkelsen). Systkini vóru átta í tali. Jóhan (Hanni), Hans Mikal (Hassegei), Elsa Maria (Essemi), Jákup Mikal (Vinni), Meinhardt, Poula, Johan Christian (Giss) og Jens Reynhold. Av systkunum eru bert Hanni, Essemi og Poula á lívi.

Sum uppvaksin í einum fiskimannaheimi í 30`unum vóru lívskorini fátæk, men barnaárini vóru góð og trygg undir teimum umstøðunum sum nú einaferð ráddu.

Meinhardt gjørdist sum unglingi hervuliga sjúkur av difteritus. Hann gjørdist eina tíð lammaður, og læknarnir spáddu at hetta kom at merkja hann alt lívið. Men so var ikki. Hansara ókúguligi lívsvilji sum sermerkti Meinhardt alt lívið, gjørdi at hann kom fyri seg aftur.

Sum 19 ára gamal fór hann, til skips við línubátinum Oyrasker av Toftum. Tað lá væl fyri hjá Meinhardt at fiska og boð vóru ofta eftir honum at koma við ymiskum skipum.

Ì fimti árunum valdi Meinhardt at fara til Ìslands at fiska, og var við íslendskum skipum tey næstu tíggju árini. Hesa tíðina var hann við nót-, línu, trol- og garnaskipum. Meinhardt var ógvuliga væl dámdur av íslendsku skipsfeløgnum. Hann var m.a. við kenda rokskiparanum Siggi Magg úr Vestmannaoyggjunum við bátinum Viðir, og úrtøkan var sera góð. Fiskað var útfrá bygdum á Eskifirði, Vestmannaoyggjunum, Hornafirði og Ólafsvík.

Meinhardt upplivdi mangar baldrutar túrar á sjónum, men ongantíð var hann ræddur. Hann var við trolaranum Austfirðingi av Eskifirði í 1959 undir Eysturgrønlandi, tá herviligt ódnarveður brast á, og onkur av íslendsku trolaranum sukku, tí teir ikki megnaðu at bera tann nógva ísin sum legðist á skipini. Eftir tógvið stríð, eydnaðist Austfirðingi at vinna upp havn, takkað verið m.a. góðum sjómansskapi frá føroyingunum sum vóru við trolaranum.




Saman vóru vit báðir í 2005 og vitjaðu støðini hann hevði fiskað útfrá. Tá sá eg, hvussu stóra virðing Meinhardt hevði frá sínum gomlu skipsfeløgum, sum ein sera dugnaligur og raskur fiskimaður.

Fíggjarliga úrtøkan av fiskiskapinum í Ìslandi var so góð, at tá hann bygdi sær sethúsini í Runavík í 1959, rindaði hann tey kontant.

Meinhardt giftist í 1959 við Mariu Mortensen (Mia) av Argjum og fingu tey trý børn. Hertha, Jónstein og Josefina..

Tá Meinhardt gavst at fiska við íslendingum fór hann til skips við føroyskum skipum, bæði til ísfisk og saltfisk.

Fyrst í 70'unum gjørdist Meinhardt sjálvstøðugur útróðrarmaður. Fekk sær bát sum fekk navnið Maria eftir konuni, og fekst við hetta yrkið heilt fram til 2007, tá hann sum 77 ára gamal gavst tí heilsan byrjaði at bila. Hesi 35 árini, hann var útroðrarmaður í Runavík, hevði hann fýra bátar sum allir bóru navnið Maria. Sera væl lá fyri at fiska, og var Meinhardt ein av allarbestu útróðramonnum hvat úrtøku viðvíkti.

Farið var upp tíðliga á morgni. Stamparnir, sum hann sjálvur hevði egnt, fingnir innanborða og síðan av stað at fiska. Hann segði altíð, at best var at vera á fiskileið í lýsingini, og sum oftast var hann heima aftur tíðliga seinnapartin við góðari veiðu. Seinni fekk Meinhardt hummaraloyvi og hetta kombineraði hann við línuveiðu og væl lá fyri.

Var onkuntíð við Meinhardt og eg mátti ásannað, at kreftirnar vóru góðar, sjálvt um hann var komin væl til aldurs. Kvikur og bráður syfti hann teinirnar inn sum einki, og kvikur tók hann hummararnir úr, og so at taka næstu teinu inn. Minnist einaferð at sonurin Jónstein og eg skuldu draga teinirnar, tí Meinhardt hevði fingið skaðað í økslina. Nógvur mjørki var, og vit funnu ikki allar boyurnar. Komnir til lands bjóðaði Meinhardt at koma við, og skjótt fann hann boyurnar og so at draga. Hetta var hansara eyðkenni; ongantíð at geva upp, men vera grammur.

Meinhardt var veiðumaður í orðsins sanna týdningi. Dámdi sera væl at skjóta harur og fugl og fjasaðist eisini við seyð, og tað gekk nógv uppá at fáa góða vekt á seyðunum.

Meinhardt var sera góður við konuna Miu, og dugdu tey væl at húsast. Lívið sum útróðrarmaður var eitt serligt yrki. Tað gevur frælsi, men úrtøkan er skiftandi, og hjúnini dugdu sera væl at húsast undir slíkum umstøðum.

Meinhardt var ógvuliga góður við síni børn, og var errin av teimum, at tey øll kláraðu seg væl. Meinhardt var eisini sera góður við abbabørnin,i og var ógvuliga errin tá hann var uppkallaður av soninum hjá mær og Herthu.

Meinhardt mundi kenna á sær at hansara síðsta løta á hesi fold var við at renna út, tá vit báðir vóru á veg til Havnar tveir dagar áðrenn hann andaðist. Hann kysti konuna farvæl í Runavík, ringdi sonin Jónstein upp og segði við meg, at hann ikki væntaði at koma heimaftur.

Við takksemi og virðing fyri alt tað tú vart fyri okkum og við góðum minnum.

**Egil**